Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	17.09.2025
Mál nr.:	25/25006
Málsviðgjørt:	LD/JáR
Ummælistíð:	18.09 til 30.09
Eftirkannað:	08. okt. 2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yrkisskúlar og løgtingslóg um skúladepil í Marknagili
(Avtaka kommunala rakstrarstuðulin til lærlingaundirvísing)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 106 frá 29. desember 1998 um yrkisskúlar, sum broytt við løgtingslóg nr. 156 frá 20. desember 2001, verða § 13, stk. 2 og 3 strikað.

§ 2

Í løgtingslóg nr. 79 frá 22. mai 2015 um skúladepil í Marknagili verður § 3 og yvirskriftin yvir § 3 strikað.

§ 3

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Nú eldraøkið í aðrari lóggávu fær ábyrgdina av at veita alla tænastu til fólk við demens, verður hetta høvið eisini brúkt til at gera fíggjarligu umsitingina hjá kommunum og landi einfaldari, soleiðis at land og kommunur ikki senda gjøld sínámillum, sum tó kunnu verða javnað móti hvør øðrum. Tí verður kommunala gjaldið til yrkisskúlar tikið av, samstundis sum landið ikki skal rinda fyri tilboð til demenssjúk, sum kommunurnar nú yvirtaka sambært lóg.

Upphæddirnar, sum hava verið goldnar til hesi bæði økini, eru á leið tær somu, umleið 4,6 mió. kr. Fyri yrkisskúlarnar merkir hetta, at umsitingin verður einfaldari á hesum økinum. Tað verður ikki neyðugt hjá skúlunum at gera upp, hvørjari kommunu teir einstøku lærlingarnir koma frá, og hvørjar rakstrarútreiðslur eru knýttar at hvørjum einstakum lærlingi. Frameftir verður tað landskassin, sum rindar allar rakstrarútreiðslurnar.

1.2. Galdandi lóggáva
Kommunali rakstrarstuðulin til lærlingaundirvísing er ásettur í tveimum lógum.

Fyri Tekniska skúla í Klaksvík, sum framvegis er sjálvsognarstovnur, er kommunali rakstrarstuðulin ásettur í § 13, stk. 2 og stk. 3 í løgtingslóg nr. 106 frá 29. desember 1998 um yrkisskúlar, sum broytt við løgtingslóg nr. 156 frá 20. desember 2001.

Fyri Glasir, sum partvíst er framhald av sjálvsognarstovnunum Tekniska skúla í Tórshavn og Føroya Handilsskúla, er galdandi lóg § 3 í løgtingslóg nr. 79 frá 22. mai 2015 um skúladepil í Marknagili.

Eftir galdandi lóggávu er rakstrarstuðulin til lærlingaundirvísing rindaður við 80% frá landskassanum og 20% frá kommununum. Landskassin hevur í fyrstu atløgu lagt út fyri kommununnar part av útreiðslunum til lærlingaundirvísingina, og síðani verða kommunurnar kravdar eftir sínum parti sambært heimstaðnum, ið lærlingarnir høvdu, tá teir byrjaðu skúlagongdina sum lærlingur.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at lætta um umsitingina, soleiðis at land og kommunur ikki senda gjøld millum sín, sum kunnu verða útlíknað móti hvør øðrum.

Sum sagt, fyri yrkisskúlarnar merkir hetta, at umsitingin á hesum økinum verður einfaldari. Skúlarnir skulu ikki longur gera upp, hvørja kommunu teir einstøku lærlingarnir hoyra til, og hvørjar rakstrarútreiðslur eru knýttar at hvørjum lærlingi. Frameftir verður tað landskassin, sum rindar allar rakstrarútreiðslurnar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Uppskotið fer at hava við sær, at umsitingin verður lættari í skúlapartinum á yrkisútbúgvingarøkinum, sum ikki longur skal gera upp, hvat skal skuldskrivast kommununum

fyri lærlingaundirvísingina. Hetta er ein fyrimunur fyri skúlarnar og fyri landskassan. Fyri kommunurnar vil hetta eisini gera umsitingina einfaldari, tí tær ikki longur skulu rinda fyri lærlingar í teirri kommunu, sum teir koma frá.
Hvørjar fylgjur nýskipanin hevur fyri kommunurnar annars, tá hugsað verður um umsitingina av demensøkinum, er ikki partur av hesum lógaruppskotinum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið varð tann 18. september 2025 sent til ummælis við ummælisfreist tann 30. september 2025. Uppskotið varð lagt alment út á heimasíðuna hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá:

Kommunufelagnum
Undirvísingarstýrinum
Glasi
Tekniska skúla í Klaksvík
Almanna- og mentamálaráðnum
Yrkisdeplinum
Vinnuhúsinum

Føroya Arbeiðsgevarafelag vísti á, at sambært viðmerkingunum er talan um, at kommunurnar frameftir skulu rinda fyri tilboð til demenssjúk, sum verða yvirtikin sambært lóg, meðan landið yvirtøkur alla fíggingina av yrkiskúlunum, og at samlaða upphæddin er á leið tann sama. **Føroya Arbeiðsgevarafelag** endar við at staðfesta, at lógaruppskotið ikki ávirkar samlaðu fíggingina til yrkisskúlarnar, og tískil verða ongar viðmerkingar gjørdar til lógaruppskotið.

Almanna- og mentamálaráðið hevur boðað frá, at ongar viðmerkingar eru.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Fíggjarligu avleiðingarnar fyri landið eru, at landskassin frameftir fer at rinda ta upphædd, sum kommunurnar higartil hava goldið til lærlingaundirvísing. Tó er talan ikki um meirútreiðslur, tí upphæddin svarar til ta minniútreiðslu, sum landskassin fær, tá kommunurnar yvirtaka ábyrgdina og útreiðslurnar fyri fólk við demens undir fólkapensjónsaldur. Henda upphædd verður mett at vera umleið 4,6 mió. kr, og hetta má takast við í fíggjarlógaruppskotið fyri 2026.

Lógaruppskotið er ein partur í eini tilgongd, har kommunurnar yvirtaka ábyrgdina og fíggjarligu útreiðslurnar fyri fólk við demens, sum eru undir fólkapensjónsaldur. Upphæddin, sum kommunurnar hava goldið fyri lærlingaundirvísingina, svarar til tær útreiðslur, ið eru tongdar at fólki við demens undir fólkapensjónsaldur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað fer at lætta um umsitingarliga hjá bæði landi og kommunum. Fyri landið merkir hetta, at yrkisskúlarnir ikki skulu gera upp, hvussu nógv kommunurnar skulu skuldskrivast pr. lærling á hvørjum ári. Og Gjaldstovan skal ikki krevja upphæddirnar inn frá kommununum, sum í fyrstu atløgu er lagt út fyri. Kommunurnar fáa ikki uppkrøv fyri lærlingaútreiðslur, og fer hetta umsitingarliga eisini at lætta um.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur við sær, at heimstaðarkommunan hjá lærlinginum ikki longur skal skuldskrivast fyri rakstrarstuðul til lærlingaundirvísing. Hetta er galdandi fyri allar kommunur í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki ávirkan á millumtjóðasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi sáttmálar.

1) Hoyvíkssáttmálin
Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við *Løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2006 um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan – Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin.* Sáttmálin hevur virkað frá 31. august 2005.

Uppskotið hevur tí ikki avleiðingar á Hoyvíkssáttmálan.

2) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS
Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention.

Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar á Evropeiska mannarættindasáttmálan.

3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek
Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við *Bekendtgørelse nr. 20 af 15. november 2017 af FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap.*

Sáttmálin er kunngjørdur við *Bekendtgørelse nr. 20 af 15. november 2017 af FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap.*

Mett verður, at broytingarnar í lógaruppskotinum ikki hava avleiðingar í mun til Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ongar markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing v.m.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ávirkan á skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ávirkan á gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Heimild verður ikki longur at krevja kommunurnar eftir rakstrarstuðli til lærlingaundirvísing.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Stk. 2 og 3 í § 13 í løgtingslóg um yrkisskúlar verða sett úr gildi í sambandi við, at tann kommunali rakstrarstuðulin til læringaundirvísing verður avtikin.

Til § 2
Somuleiðis verður § 3 og yvirskriftin yvir § 3 í løgtingslóg um skúladepil í Marknagili sett úr gildi, tí at tann kommunali rakstrarstuðulin til læringaundirvísing verður avtikin.

Til § 3
Lógin fær gildi 1. januar 2026.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 4. november 2025

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

+Fylgiskjøl

Fylgiskjal 1 – Hoyringarsvar frá Almanna- og mentamálaráðum

Fylgiskjal 2 – Hoyringarsvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag